**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til EM í Budapest 2020

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi úttøkuskipan til EvropaMeistarastevnuna í svimjing 2020, sum verður í Budapest í Ungarn frá 11. til 17. mai 2020.

Úttikin verða tær báðar kvinnuligu og teir báðir mannligu svimjararnir, sum í kravtíðarskeiðnum klára bestu avrik yvir 700 FINA (2020) stig á langgeil (50m).

Sí FINA 2020 talvurnar her:

- Kvinnur: https://www.fina.org/sites/default/files/fina_points_-_lcm_2020_female_.pdf
- Menn: https://www.fina.org/sites/default/files/fina_points_-_lcm_2020_male_.pdf

Dømi: Pál Joensen hevur svomið besta føroyska avrik yvirhøvur, sum var 14:46.33 í 1500 frí á langgeil á HM í Shanghai í 2011, sum tá gav 960 FINA stig meðan talvurnar nú siga 949 FINA stig.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing. Úttøka av juniorum kann koma upp á tal, serliga um færri enn tveir seniorar av hvørjum kyni klára kravið um 700 FINA stig.

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2020.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 21. juli 2019 (HM 2019), til og við 1. mars 2020 (t.e. SuSvim Open)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:

http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða SSF um teir svimjarar sum í kravtíðarskeiðnum hava kláruð yvir 700 FINA (2019) stig, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Vegna Svimjisamband Føroya

Rókur í Jákupsstovu

ATLANTIC AIRWAYS